ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Irakararnir, sum hjálpa okkum, koma í lívsvanda, tá vit fara heimafrur. Tí eiga teir at sleppa til Danmarkar*

*(danskir heryvirmenn í Irak)*

# Útlagnir russar í Bretlandi myrdu Litvinenko

**Russiska ákæruvaldið vil sleppa til London at avhoyra útlagnar russar, sum hava fingið uppihaldsloyvi í Bretlandi.**

Bretar og russar leita framvegis eftir tí ella teimum, sum beindu fyri fyrrverandi KGB-manninum Alexander Litvinanko. Longu stutt eftir drápið vildu bretsku myndugleikarnir vera við, at boðini um at beina fyri Litvinenko vóru komin úr Russlandi, og Scotland Yard slapp at senda menn til Moskva at gera kanningar.

Nú vil russiski ríkisadvokaturin, Yuri Chaika, sleppa at senda sínar menn til London at gera kanningar í málinum. Sambært bretska blaðnum The Times hevur hann boðað Scotland Yard frá, at russar vilja fegnir sleppa at avhoyra nakrar útlagnar russar, sum hava fingið uppihaldsloyvi í Bretlandi.

- Tað er ikki óhugsandi, at tað vóru russiskir borgarar, sum búgva uttanlands, ið myrdu Litvinenko, sigur Yuri Chaika við blaðið.

Russiska ákæruvaldið hevur ein lista við nøvnunum á umleið hundrað russum, sum búgva í Bretlandi, og fleiri teirra hava longu biðið bretsku løgregluna um vernd, skrivar The Times.

Yuri Chaika vil ikki siga, um russisku myndugleikarnir hava illgruna til nakran ávísan persón, men sambært bretska blaðnum er eingin ivi um, at russiska ákæruvaldið hevur serligan áhuga í ríkmanninum Boris Berezovsky, sum býr í London. Berezovsky hevur fleiri ferðir funnist at russiska forsetanum, Vladimir Putin, og ein talsmaður hansara sigur, at hann stúrir fyri at verða eitraður, sleppa russiskir agentar at avhoyra seg.

Viðurskiftini millum Bretland og Russland eru kølnað aftan á morðið á Alexander Litvinenko, og The Times væntar, at tey fara at kølna uppaftur meiri, nú russar vilja vera við, at morðið varð lagt til rættis í Bretlandi, og at teir seku halda til har.



*Alexander Litvinenko doyði av eitran. Kanningar vístu, at hann var vorðin eitraður við einum geiðslavirknum evni.*

## STUTT SAGT

### Løgið deyðsfall

Fríggjadagin í síðstu viku fingu foreldrini hjá tí 24 ára gamla nýsælendinginum Aaron Mahoney boð um, at sonur teirra var deyður í einari vanlukku í arabiska landinum Dubai. Aaron var íðin golfspælari og var farin á eina venjingarlegu í Dubai, men í síðstu viku varð hann brádliga tikin. Myndugleikarnir í Dubai siga, at Aaron gjørdi mótstøðu, tá ein løgreglubilur var á veg á støðina við honum. Millum annað skal hann hava roynt at kvala bilføraran við tí úrsliti, at bilurin fór runt. Stoyturin var so harður, at Aaron doyði, og at ein av løgreglumonnunum fekk skaða. Soleiðis ljóðar tann almenna frágreiðingin úr Dubai, men foreldrini hjá Aaron Mahoney halda ikki, at hetta er allur sannleikin, skrivar blaðið New Zealand Herald.

### Funnu diamantar



Russiskir vísindamenn hava funnið fleiri diamantar umleið 40 kilometrar frá norska markinum. Science News skrivar, at russar hava sent royndir av diamantunum til Suðurafrika og Bretlands til kanningar. Russiskir vísindamenn vænta at finna fleiri diamantar á Kolanesinum, skrivar Science News.

### Gott úrslit

Svensk-japanska fyritøkan Sony Ericson, sum ger fartelefonir, hevði 3,7 mia. krónur í avlopi í oktober-ársfjórðingi í fjør. Tað var meiri enn tvær ferðir meiri enn í juli- ársfjórðingi. Orsøkin til tað góða úrslitið var, at felagið seldi munandi fleiri fartelefonir enn frammanundan, sigur leiðslan. Bara í oktober ársfjórðingi seldi Sony Ericson 10 mió. fartelefonir.

# Irakar seta lívið í váða við at hjálpa USA og tess sameindu

**Irakar, sum hjálpa amerikanska herinum í Irak, eiga at sleppa til USA at búseta seg**




*Edward Kennedy*

Tað halda í hvussu er fleiri amerikanskir politikarar. Ein teirra er tann kendi demokratiski senatorurin Edward Kennedy.

- Tað er grundleggjandi órættvísi, at USA ikki kennir seg hava nakra ábyrgd av teimum irakunum, sum hjálpa okkara hermonnum, segði Edward Kennedy í einari hoyring í rættarnevndini hjá Senatinum.

Árliga sleppa 50 irakar, sum hava hjálpt amerikanska herinum í Irak, til USA at búseta seg, men fleiri senatorar halda, at hetta talið er alt ov lítið. Teir vísa á, at irakararnir, sum hjálpa teimum amerikonsku hermonnunum, seta lívið í váða, og at USA tí hevur skyldu at tryggja teimum verju.

Formaðurin í rættarnevndini hjá Senatinum, demokraturin Patrick Leahy, ávarar USA ímóti at gera sama mistak sum í Vietnam, tá amerikanski herurin slepti fleiri túsund suðurvietnamesarum upp á fjall, tá amerikanararnir í skundi fóru úr Saigon í 1975.

Edward Kennedy og Patrick Leahy krevja, at USA skal loyva nógv fleiri irakum at flyta til USA, tí fleiri teirra eru í lívsvanda, verða teir verandi í Irak.

**Eisini í Danmark**

Eisini í Danmark er orðaskifti um teir irakararnar, sum hjálpa teimum donsku hermonnunum í Irak. Í dag kom fram, at nakrir av teimum donsku heryvirmonnunum hava biðið verjumálaráðið loyva teimum iraksku tulkunum til Danmarkar, tá teir donsku hermenninir verða tiknir úr Irak Ein av tulkunum segði við danska útvarpið, at teir eru í lívsvanda frá tí degi, Danmark tekur hermenninar heim.

Men Søren Gade, verjumálaráðharri, vísir aftur uppskotinum um at loyva tulkunum at flyta til Danmarkar.